**Fylgiskjal til**
**kunngerð nr. 37 frá 20. mars 2000 um**
**gjøld fyri tænastur, sum Heilsufrøðiliga starsvstovan veitir**

# I. Gjøld fyri eftirlit, málsviðgerð, sýnistøku og líknandi

1. **Matvøruøkið undantikið fiskur til útflutnings**
   Regluligt eftirlit og umvitjan sambært matvørulógini nr. 46 frá 21.6.1985 kostar 800 kr. fyri vitjanina (ikki galdandi fyri framleiðslu av fiski og fiskaúrdrátti til útflutnings, sí II). *Smbrt. matvørulógini er ikki hava heimild at krevja gjald fyri sjálva góðkenningarvitjanina av eini eind. Heimild er bert at krevja gjald fyri eftirlitsvitjanir eftirfylgjandi.*
2. **Umhvørvisøkið**
   Regluligt eftirlit sambært reglum gjørdar við heimild í §§ 4 og 5 í umhvørvisverndarlógini nr. 134 frá 29.10.1988 kostar 700 kr. fyri vitjanina.
3. **Svimjihyljar**
   Vanligt eftirlit av svimjihylum við heimild í §§ 13 og 31 í kunngerð nr. 53 frá 3.5.1994 um umhvørvisreglur sambært Ll. Nr 134 frá 29.10.1988 um umhvørvisvernd kostar
   - 2.000 kr. fyri hvørt stað og haraftrat
   - 800 kr. fyri hvønn hyl ella bað.

   Útreiðslur fyri starvsstovukanningar í hesum sambandi er sambært galdandi príslista hjá kanningarstovuni, ið ger kanningarnar.
4. **Umbiðið arbeiði**
   Fyri umbiðið arbeiði verður goldið fyri hvønn byrjaða tíma.
   Teknikari/laborantur/eftirlitsfólk í tíðarskeiðinum
   - 07:00 – 17:00 400 kr. um tíman
   - 17:00 – 24:00 500 kr. um tíman
   - 24:00 – 07:00 og leygar-, sunnu- og halgidag 600 kr. um tíman.

   Akademikari í tíðarskeiðinum
   - 07:00 – 17:00 600 kr. um tíman
   - 17:00 – 24:00 800 kr. um tíman
   - 24:00 – 07:00 og leygar-, sunnu- og halgidag 1.000 kr. um tíman.

# II. Útflutningsváttanir

**1. Serligt gjald**

- Tá útflutningsváttanir sum t.d. heilsuváttanir ikki eru lógarkravdar, verður hetta roknað sum umbiðið, ikki MVG-skyldugt arbeiði. Minsti satsur er ein teknikari tími, t.v.s. 400 kr fyri váttanina.
- Undirskriving av útflutningsváttanum uttan fyri avgreiðslutíð stovnsins er einans smbrt. avtalu (sum skal gerast í arbeiðstíð stovnsins). Kostnaður er smbrt. kap. I, pkt. 4 (umbiðið arbeiðið), eitt fast gjald á 2 tímar fyri hvønn viðskiftara, og so tímataksturin frá klokkutíðini ið er avtala og inntil váttanin verður givin.
- Annað arbeiðið í.s.v. útflutningsváttanir, sosum útfylling av váttan, er smbrt. kap. I, pkt. 4 (umbiðið arbeiði), eitt fast gjald á 2 tímar, og so tímataksturin frá klokkutíðini ið avtala er og inntil arbeiðið er liðugt.

**2. Meirvirðisgjald**

Undirskriving av heilsuváttanum er ikki mvg-skyldugt. Tó er útfylling av heilsuváttanum mvg-skyldug vísandi til Ll. nr. 136 frá 08.09.1992.

# III. Gildiskoma

Prísásetingarnar eru í gildi frá og við 01.03.2008 og eru í gildi, um ikki aðrar prísásetingar eru kunngjørdar til avloysing av hesari.

Upplýsing um galdandi prísásetingar fæst við at venda sær til Heilsufrøðiligu starvsstovuna ella á heimasíðuni, WWW.HFS.FO.